# Hósdagur 27. september

**SVF**

18.30 Gloymdar leikur 7
18.40 Jumanji 23
19.05 Leyvudansurin - ein kinesisk søga
19.20 Á lívsins gátt
20.00 Dagur og Vika við Grannum okkara
20.50 Pápi, mamma og børn - svensk dokumentarsending
21.50 Ally McBeal - am. røð
22.35 Roomservice - íbúðin verður broytt
23.00 Krimitímin: Dalziel og Pascoe 2:2
23.50 Liðugt

**Eurosport.com**

07:30 CYCLING: Tour of Spain
08:30 SAILING: Sailing World
09:00 SAILING: Yachting Series
09:30 MOTORSPORTS: Series
10:00 CAR RACING: AutoMagazine
10:30 MOUNTAIN BIKE: UCI World Championships in Vail, Colorado, USA
11:30 CYCLING: Tour of Spain
12:30 XTREME SPORTS: European X Games Qualifier in Barcelone, Spain
13:30 CYCLING (live): Tour of Spain
16:15 NEWS: Eurosportnews flash
16:30 OLYMPIC GAMES: Olympic Magazine
17:00 XTREME SPORTS: YOZ ACTION
17:30 TENNIS (live): WTA Tournament in Leipzig, Germany
19:00 CYCLING (live): World Track Championships in Antwerp, Belgium
21:30 NEWS: Eurosportnews report
21:45 FOOTBALL: UEFA Cup
00:15 NEWS: Eurosportnews report
00:30 CLOSE

**BBC PRIME**

0.05 TLZ: »American Visions – The Wave From the Atlantic«
1.00 TLZ: »Century of Flight – Law Enforcement From the Air«
2.00 TLZ: »Adverts«
2.30 TLZ: »Le Corbusier: Villa La Roch«
2.55 TLZ: »Mind Bites«
3.00 TLZ: »Packaging Culture«
3.25 TLZ: »Pause«
3.30 TLZ: »Cybersouls«
4.00 TLZ: »Back to the Floor – What's in Store«
4.40 TLZ: »Landmarks – Tropical Rainforests – Saving the Forest«
5.00 TLZ: »Japanese Language and People – Time Out«
5.30 TLZ: »Teen English Zone
5.55 Toucan Tecs: »Peacock Palace Scoop«
6.05 Playdays
6.25 The Really Wild Show – Kenya
6.50 Celebrity Ready Steady Cook
7.20 Floyd's American Pie: »New Orleans«
7.50 Real Rooms: »Worcester Lounge«
8.20 Going for a Song
8.50 Style Challenge: »Barmaids«
9.15 Zoo
9.45 Vets in Practice: »Unfamiliar Territory«
10.15 The Weakest Link
11.00 Dr. Who: »Planet of Fire«
11.30 Classic Eastenders
12.00 Eastenders
12.30 Hetty Wainthrop Investigates: »Widdershins«
13.30 Celebrity Ready Steady Cook
13.55 Style Challenge: »Dinner Ladies«
14.20 Toucan Tecs: »Peacock Palace Scoop«
14.30 Playdays
14.55 The Really Wild Show – Kenya
15.20 Totp Eurochart
15.50 Great Antiques Hunt: »Blackpool«
16.20 Gardeners' World
16.50 Miss Marple: »The Moving Finger«
17.45 The Weakest Link
18.30 Cardiac Arrest: »The Critical Hour«
19.00 Eastenders
19.30 Heartburn Hotel
20.00 Down to Earth: »My Kingdom for a Horse«
21.00 French & Saunders
21.30 Seeking Pleasure: »Retirement«
21.40 Holiday Snaps: »Cambridge/ Glasgow/Sandiego/ Keswick«
22.30 Muscle
23.00 Out of Hours
23.15 A Little Later: »Oasis«

**BBC WORLD**

0.00 BBC News
0.30 HARDtalk (r)
1.00 BBC News
1.30 Holiday (r)
2.00 BBC News
2.30 Reporters (r)
3.00 BBC News
3.30 Asia Today (r)
3.45 World Business Report (r)
4.00 BBC News
4.30 HARDtalk
5.00 BBC News
5.30 World Business Report
6.00 BBC News
6.30 World Business Report
7.00 BBC News
7.30 World Business Report
7.45 Sport Today
8.00 BBC News
8.30 Talking Movies (r)
9.00 BBC News
9.30 HARDtalk (r)
10.00 BBC News
10.30 Holiday (r)
11.00 BBC News
11.30 Australia Direct (r)
12.00 BBC News
12.30 HARDtalk (r)
13.00 BBC News
13.30 World Business Report
13.45 Sport Today
14.00 BBC News
14.30 Top Gear (r)
15.00 BBC News
15.30 Australia Direct (r)
16.00 BBC News
16.30 Asia Today
17.00 BBC News
17.15 World Business Report
17.30 Talking Movies (r)
18.00 BBC News
18.30 World Business Report
18.45 Sport Today
19.00 BBC News
19.30 HARDtalk (r)
20.00 BBC News
20.30 Click Online
21.00 BBC News
21.30 World Business Report
22.00 BBC News
22.30 Life
23.00 BBC News
23.30 World Business Report (r)
23.45 Asia Today

**TV3**

05:00 Børne-hjørnet med Disney
07:00 TV-shop
08:00 Panter-tanter(G)
08:25 Ricki Lake (G)
09:15 Ricki Lake
10:10 Horton-sagaen(G)
11:00 Horton-sagaen
11:50 Blossom(G)
12:20 Panter-tanter
12:50 Vild med dig
13:15 Pæn pige - sej sild
13:45 Baywatch Hawaii(G)
14:40 Blossom
15:10 Min kære familie
15:40 Baywatch Hawaii
16:35 Ricki Lake
17:30 Alle tiders barnepige
18:00 Felicity
19:00 Robinson - Talkshow
20:00 Halløj i klosteret
21:55 Tve-kampen VIP(G)
22:55 Brian vs Tyson: Før braget i Parken
23:00 Vore værste år
23:30 Simpsons
00:00 Ti tommelfingre
00:30 Ricki Lake(G)
01:25 Vore værste år (G)
01:55 Simpsons(G)
02:25 Sunset Beach
03:10 Godnat

**ÚF**

07.00 Tíðindi
07.05 Morgunlestur
Marianna Simonsen í Miðvági lesur
07.15 Barnaløtan
Jonna Olsen og Kári Sólstein leggja til rættis
07.30 Tíðindi
07.35 Góðan morgun Føroyar
08.00 Tíðindi
08.05 Góðan morgun Føroyar
09.00 Tíðindi
09.03 Frásøgn (e)
Árni Joensen skrivar.
09.35 Dagsins tónar
09.50 Morgunlestur (e)
Marianna Simonsen í Miðvági lesur
10.00 Tíðindi
10.05 Fimleikaløtan 2
10.10 Tit skriva, vit spæla
Øssur Egholm skipar fyri
11.00 Tíðindi
11.03 Undir døgurða
12.00 Veðurtíðindi
12.03 Middagstónleikur
12.15 Skráin og lýsingar
12.20 Tíðindini
12.40 Døgurðatónar
13.00 Tónatímin
14.00 15 tær bestu (e)
Heðin Arge stílar fyri
15.00 Tíðindi
15.03 Nýtt og gott gamalt
Tróndur Vatnhamar velur løgini
16.00 Tíðindi
16.03 Handan hav (e)
Tónleikasending hjá Fróða Løkságarð.
17.00 Tíðindi
17.05 Í víngarðinum
Alexander Samuelsen leggur til rættis
18.00 Barnaløtan (e)
Jonna Olsen og Kári Sólstein leggja til rættis
18.25 Skráin og lýsingar
18.30 Tíðindini
18.50 Tónleikur
19.00 Hvussu við mær?
Framhaldssøga eftir Colby Radowsky. Knút Olsen týddi. Katarina Nolsøe lesur. 8. partur
19.30 Løg mær dámar
3. sending hjá Eirik Suna Danielsen
20.00 Ljóðmúrurin
Bjarni Mohr leggur til rættis.
21.00 Fimleikaløtan 2 (e)
21.05 Dagsetur
Øssur Egholm leggur til rættis
22.00 Tíðindi

**Rás 2**

09:45 Orðið
Bíbliulestur v/ Anju Hansen
10:00 Go'morin
11:00 Birgir Beinleiðis
Birgir Sondum við gesti
12:00 Tíðindi
12:10 Lættur tónleikur
13:30 Ynskiløtan
Send heilsur via (www.ras2.fo) ella á fax. 359990.
15:00 Tíðindi
15:10 Ynskiløtan (framhald)
16:00 Lættur tónleikur
17:00 Norðlýsið
Aktuell sending úr Studio 7 í Klaksvík
John William og Oliver Joensen leggja til rættis
18:00 Tíðindi
18:10 Lættur tónleikur
19:00 Orð á leiðini EvR Sending
Terrorisma, synd og óndskapur. 1 (2)
Jógvan Zachariassen leggur til rættis.
19:40 Tónleikur
21:00 Tíðindi
21:15 Orðið (e)
Bíbliulestur v/ Anju Hansen
21:30 Girlzone
Undirhaldssending fyri ung, Súsanna Clementsen og Ruth Reinert skipa fyri. Telefon: 35 99 93 Fax: 35 99 90 E-mail: girlzone@ras2.fo
00:00 Liðugt

**Lindin**

13.00 Byrjan – Dagsskráin verður lisin
13.15 Okkara dagliga breyð
13.30 Sjómanssendingin Vitin v/ Símun Hansen (e)
14.30 Tónleikur fyri børn
15.00 Tónleikur
18.00 Dagsins Orð eftir Svenning av lofti
19.00 Brot og bitar ein ørvísi tíðindasending.
19.15 "The finishing touch" v/ Alex O'Campo
20.30 Okkara dagliga breyð
20.40 Lýsingar fyri møtir ið verða í vikuskiftinum.
20.55 Dagsins Orð eftir Svenning av lofti (e)
21.00 Bønarlinjan við gesti, vertur er Jenis av Rana
Bønarevni kunnu ringjast inn frá kl. 20.00. Tlf. 321377 og til ber at senda fax á nr. 321379
Vit gevast uml. middnátt

## "Á lívsins gátt", tc 32.18 (e)




Mong menniskju í nýmótans samfelagnum hava ta fatan, at ein føðing eigur ikki at vera long og trupul. Hjálpitól og hent-leikar áttu at bøtt um hetta, halda tey. Í sendingini "Á lívsins gátt" fylgja vit ljósmóðurini Eyðfríð L. Jacobsen, sum starvast á Landssjúkrahúsinum. Hennara uppgáva er at kanna og vera um kvinnur, sum skulu føða. Og so má hon mangan greiða teimum óttafullu frá, at ein føðing kann ikki stýrast allan vegin við hjálpitólum og hentleikum. Í sendingini hitta vit eisini nøkur ung pør, sum fáa børn.

*Lagt til rættis: Ingun í Skrivarastovu.*
*Fotografur: Bjarni Rubeksen.*
*Klipt: Ragnar A. Jacobsen.*
*Frásøgufólk: Malan Johannesen.*

## Halløj i klosteret

*- Amerikanskur skemtifilmur frá 1992*




Showgentan Deloris (Whoopi Goldberg) verður vitni til eitt mafiadráp, og løgreglan brúkar hana sum vitni í rættinum. Ákæruvaldið krógvar hana í einum nonnuklostri í San Fransisco fyri at verja hana ímóti mafiuni.

Deloris keðir seg sum nonna ,og fyri at fáa tíðina at ganga spyr hon um loyvi at yvirtaka kórið í klostrinum, sum ikki altíð ljóðar líka gott.Uttan at vita hvat hetta førir við sær, lata tey Deloris yvirtaka kórið, og knappiliga kemur ferð í skjúrtini - hatta slagið av tónleiki hava nonnurnar ikki sungið fyrr



# Laksaprísirnir í botni

**Tá prísurin á laksi var hægstur fyrra hálvár í fjør, lá hann um 35 — 37 kr/kg. Síðani tá er ein støðug lækkan verið, og liggur prísurin júst nú um 19 — 20 kr/kg.**

ALIVINNA
*Ingrid Bjarnastein*

- Orsøkina til lækkingina havi eg onga beinleiðis uppskrift uppá, sigur Regin Jacobsen, stjóri á Bakkafrost á Glyvrum. — Men prísurin er ógvuliga javnur nú, og eg vænti ikki, at hann lækkar meira.

Síðani fyrra hálvár í fjør er prísurin á laksi fallin við umleið einum triðingi. Tá lá prísurin um 27 — 30 kr/kg. Men umleið tvær vikur í fjør var prísurin heilt uppi á 35 — 37 kr/kg.

- Prísirnir eru lækkaðu spakuliga niður á 23 — 24 kr/kg, men innan fyri tvær vikur í juni mánaða fóru prísirnir brádliga niður á 20 — 21 kr/kg. Harfrá var so ein støðug lækking á 10 — 15 oyru um vikuna niður á tað, sum prísurin er nú. Men núverandi prísur er rættiliga støðugur, og hevur hann ligið har síðani á ólavsøku, greiðir Regin Jacobsen frá.

### ILA ikki orsøkin

Regin Jacobsen sigur, at orsøkin til príslækkingina er ikki ILA. Marknaðarprísurin er soleiðis júst nú, so hetta er ikki bert ein trupulleiki í Føroyum.

— Ein grund til lækkingina er tó, at laksaframleiðslan í Chile er nærum tvífaldað innan eitt ár. Hetta hevur havt við sær, at framleiðslan bæði í Føroyum, Noregi og Skotlandi er minkað munandi. Men Chile hevur ætlanir um at minka vøksturin og fáa laksin av høvuðsmarknaðanum við at gera hann til dósamat, sigur Regin Jacobsen.

### Avleiðingar

Spurdur um, hvørjar avleiðingar hetta kann koma at hava fyri alivinnuna í framtíðini, svarar Regin Jacobsen stutt og greitt: - Minni vinningur. Minni avlop. Verri rokniskapur. Minni møguleiki fyri at gera íløgur, og um ein hevur gjørt ov stórar íløgur, kann hetta gerast ein trupulleiki.

- Nú og fram til jólar er góð tíð at selja, sigur Regin Jacobsen. — Tá laksaprísirnir lækka, veksur eftirspurningurin jú. Tí vænta vit, at fram ímóti jólum er mongdin av laksi á marknaðinum minkað so mikið, at prísirnir fara at hækka aftur.

### Framleiðslan til USA steðgað

At tað í hesum døgum er vandi fyri kríggi hevur so at siga onga ávirkan á sølumarknaðin. Talan er her bert um 10 — 50 tons um vikuna, ið flutt verða til USA, so hetta ávirkar ikki framleiðsluna stórvegis.

— Parturin av okkara framleiðslu til USA er steðgaður síðani álopini í síðstu viku, men verður tikin uppaftur, fortelur Regin Jacobsen. — Tann feska vøran, ið vit flyta til USA fer jú við ferðafólkaflogførum, og hetta er sett forboð ímóti nú. Tá byrjað verður aftur, verður alt flutt við farmaflogførum, og hetta verður helst tikið uppaftur í næstum.



# Evnislestrar um arbeiðsmarknaðarviðurskifti

**Hósdagin 4. oktober verða ymsir evnislestrar á Hotel Føroyum. Tað er Vinnuhúsið, ið skipar fyri, og fara tey at viðgera arbeiðsmarknaðar lógir og lógarbroytingar hesum viðvíkjandi, ið eru gjørdar seinasta árið.**

ARBEIÐS-MARKNAÐUR
*Ingrid Bjarnastein*

Hevur tú spurningar um barsilsskipan, dagpeningalóg, vanlukkutryggingar, arbeiðsumhvørvi ella yrkisútbúgvingar , so er bert at fara til evnislestrarnar, ið verða hildnir júst í hesum sambandi.

Frá klokkan 9.30 til klokkan 16.00, tann 4. oktober 2001, verða fimm ymsir evnislestrar á Hotel Føroyum í Havn. Annika Mikkelsen, málsviðgera kemur at fortelja um viðkomandi spurningar um barsilsskipanina. Td. hvørji rættindi og hvørjar skyldur løntakarin og virkið hava. Og hvussu ein yvirhøvur søkir barsilspening?

Petra Joensen, stjóri á Almannastovuni, Anne Djurhuus, deildarleiðari og Joan Hendrik S. Samuelsen, løgfrøðingur fara at viðgera dagpeningalógina. Svarað verður m.a uppá, nær ein hevur rætt til dagpening og hvussu farið verður fram, tá ein søkir dagpening. Tey fara eisini at fortelja um sjálvt innihaldið í dagpeningalógini.

Umboðið fyri vanlukkutryggingar er Virgar Hvidbro, kunningarleiðari. Hann fer at greiða frá tí nýggju arbeiðsumhvørvislógini og hvørji krøv verða sett til virkini viðvíkjandi hesi nýggju lóg. Virgar Hvidbro fer eisini at viðgera trygdarskipanina, hvíldartíð og arbeiðið hjá børnum og ungum.

Formaðurin í Yrkisútbúgvingarráðnum, Petur Zachariassen og Petur Oluf Hansen, fyrisitingarleiðari á Yrkisdeplinum fara í samband við yrkisútbúgvingar millum annað at greiða frá viðurskiftunum millum lærling, virki og skúla.

Kostnaðurin fyri evnislestrarnar er 600 krónur fyri limir í Vinnuhúsinum, og 900 krónur fyri ikki limir. Við í prísinum er matur og tilfar. Um ein hevur hug at vera við er møguligt at tekna seg í Vinnuhúsinum á tlf. 31 18 64 ella á teldupostadressuni: industry@industry.fo Seinasta freist fyri tilmelding er mánadagin 1. okt. 2001.

Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!